tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Undirsjóvartunlar uppá gott og ilt

Oddagrein

LØGTINGIÐ samtykti herfyri lógina, sum gevur grønt ljós fyri undirsjóvartunnli um Vestmannasund ella rættari undir Vestmannasund. Og nettup orðið undir hevur stóran týdning í so máta. Gerast skal ein langur tunnil væl undir havbotninum, gjøgnum grót og fláir, sum vit bara lutvíst kenna nakað til. Tað verður sagt, at tað er vandi í hvørjari valferð, men hetta orðatakið kann gerast ein dýrur læripeningur, um vit koma hartil at skula staðfesta, at forkanningarnar til komandi undirsjóvartunnilin eru (vóru) ikki nóg góðar og nóg fullfíggjaðar.

TÁ vit skulu gjøgnumføra eina verkætlan her á klettunum, verður oftani víst til hepnar royndir aðrastaðni. Ein hevur so løgið tað ljóðar kortini lyndi til at koyra undir teppið ringar royndir aðrastaðni. Eitt annað orðafelli sigur: „Heldur fyrivarin enn eftirsnarin". Og kanska er tað hetta orðafellið, sum vit eiga at taka eitt sindur meira í álvara, tá tað snýr seg um eitt tað største byggiprojektið í Føroya søgu. Tað er mett til at kosta einar 200 til 300 mill. kr. men hyggja vit eftir teimum óhepnu royndunum aðrastaðni, eitt nú í Noregi, so kann væl henda, at samlaði kostnaðurin fer langt upp um milliardina, tá avtornar, tí tað nettupp ikki verður turt. Marran í hesum er, um vit koma gjøgnum so leyst gróttilfar, at talan verður um skrúvuna uttan enda, tá borast og tettast skal. Í Noregi eru dømi um, at teir nettupp tí at teir ikki kannaðu nóg væl undirlendið, hava verið noyddir at betala í dýrum dómum at fáa tunnil tættin. Okkum vitandi hava bert verið gjørdar stakroyndir av undirlendinum. Spurningurin er tá, um tað ikki átti at verið gjørt størri kanningararbeiði, áðrenn farið verður undir at bora. Sjálvandi kanst tú ikki tryggja teg móti øllum, ein minimal óvissa vil vera við øllum slíkum arbeiði, men hava vit nú minimera hana, nú farast skal undir hetta risastóra projektið?

ÁHUGAVERT kundi verið at fingið at vitað úr Noregi, hvørjar royndir teir hava gjørt sær í so máta. Hvat hendir, um undirsjóvartunnilin fer at renna seg inn í somu trupulleikar, sum teir, ið tóku seg upp í bergholinum millum Lopra og Sumba! Hvør stendur tá um endan, hvør skal tá fíggja - um tað í heila takið ber til - tær upphæddir, sum skulu bøta um skaðan?

TAÐ fer einki av hesi verkætlan við at gera heimaarbeiðið tvs. forarbeiðið optimalt. Spurningur okkara er: er forarbeiðið gjørt optimalt nokk?

Sosialurin

Viðmerking:

Alkoholið tikið yvirhond í tinginum

Oyggjatíðindi skrivar í blaðnum mikudagin 8. mars 2000 um, at tingformaðurin Finnbogi Ísakson var ávirkaður av rúsdrekka leygardagin seinnapartin, tá tingfundur var, og at hetta við fullum tingmonnum alt ov ofta kemur fyri.

Tað kunnu vit bert taka undir við.

Eisini skrivar blaðið, at Dimmalætting fyrr hevur umrøtt hetta óskil. Men at blaðið nú tigur.

Nei blaðið tigur ikki. Tað passar, at vit hava skrivað um hetta óskil. Og upplýsast kann eisini, at annar av politikarunum, sum føldi seg raktan - og tað av røttum - umvegis lat ábyrgdarblaðstjóran á Dimmalætting vita, at hetta vóru grovar skuldsetingar, sum kravdu aftursvar.

Men higartil er einki aftursvar komið frá hesum sama. Og nú eru nógvir mánaðir gingnir, síðani tær reglur vóru skrivaðar.

Orsøkin til, at Dimmalætting ikki hevur skrivað um fulla tingformannin leygardagin 4. mars 2000 kl. 13.30, er, at tá tíðindini fræettust, var undirritaða á veg í tingið fyri við egnum eygum at síggja, hvussu skilið var, men eg var ov sein. Náddi ikki at síggja sjón fyri søgn. Tí sera skjótt varð gjørt av henda seinnapartin, hóast tað ikki vóru mong, sum skiltu, hvat tingformaðurin segði.

Tingfundurin er tó festur á band, um nakar ivast.

Og fyri ikki bara at skriva frá tí, sum onnur høvdu at fortelja, hvat tey upplivdu í tinginum henda seinnapartin, valdu vit at bíða.

Tó eitt skal vera heilt vist: Teir tinglimir, sum vóru vitni til tað, sum fór fram frá tingsins røðarapalli leygardagin, kunnu ikki vera stórt frægari enn tingformaðurin, við at halda hondina yvir politiskan fólkavaldan starvsfelaga, sum hevur trupulleikar við alkoholi. Tinglimir eru til arbeiðis, tá tingið er saman, og tá má minsta krav vera, at teir eru appelsinfríir.

Í landsstýrinum sigast tey hava ein alkoholpolitikk. Har eru fólk uppsøgd, sum ikki hava stýr á hesum sterka drykki.

Tórshavnar býráð hevur eisini ein alkoholpolitikk við tilboð um viðgerð.

Tað hava øll stór arbeiðspláss.

Hvat við løgtinginum, sum skal eitast fyri bæði at hava skil á lógarsmíði, og hvussu onnur skulu bera seg at!

Og hví marsjeraðu ikki bara allir tingmenn- og kvinnur út, tá tey sóu, hvussu skilið var á tingformanninum henda dagin?

Hvar var tigin?

Onkur mátti verið so frægur, at hann tók mannin til viks, so hann ikki gjørdi sær sjálvum og landi okkara fyri skommum frá tingsins røðarapalli!!!

Og hvør tinglimur er so mikið at sær komin, at hann vil koma alment fram og bart út siga, at vit finna okkum ikki í at hava fullar tinglimir inn í salinum!

Hendingin leygardagin var ikki naka eindømi. Í nógv ár hevur alkohol verið ein trupulleiki í løgtinginum.

Og tá tað er her, at landsins lógir verða smíðaðar, ber ikki til, at hetta verður gjørt við góðari kenning! Vit taka fult undir við tí, sum Oyggjatíðindi skrivar um henda trupulleikar í blaðnum í gjár.

Tað er heldur ikki nøkur loyna, at føroysk tíðindafólk fyri langari tíð síðani hava tosað saman um, hvussu vit skulu bera boðskapin um rúsávirkaðar politikkarar víðari til almenningin í staðin fyri at tiga trupulleikan í hel.

Men nú er so hol sett á.

Beate L. Samuelsen
ábyrgdarblaðstjóri
Dimmalætting

Stórt tiltak á Læraraskúlanum leygardagin

Leygardagin 11. mars hava gulu skótarnir stórt tiltak á Lærsraskúlanum.

Endamálið er at savna inn pening til Onglandsferð hjá 35 skótum í summar.

Tiltakið letur upp kl. 10 á morgni, og stendur við til kl. 18

Á skránni er nógv ymiskt til børn og til barnsligar sálir, eitt rættiligt tiltak fyri alt húskið.

Har verður møguleiki at fáa andlitið málað, og at flætta stuttligar flættur.

Møguleiki verður eisini at klintra á einum klintriveggi, syngja barnasangir, at dansa, hoyra søgur og síggja film.

Í Læraraskúlahøllini verður við jøvnum millumbilum vístur filmur frá onkrum legum, sum skótar hava verið á fyri árum síðani, og Klokkan 16.00 fer gitna kórið Unitet Voices at syngja í ein hálvan tíma.

Kórið venur hendan dagin á skúlanum til stóra konsert, sum verður í Fríðriksskirkjuni sunnudagin. Leiðari á kórinum er Eirikur Skála.

Og so er sjálvandi stórur **loppumarknaður** og **gott køkutombola.**

Allan dagin ber eisini til at keypa okkurt at eta og drekka í matstovuni á skúlanum, og lagt er upp til ein veruligan hugnadag hjá øllum í húsinum á Læraraskúlanum henda leygardagin.

Er onkur, sum hevur gott tilfar til loppumarknaðin, ber til at koma við tí fríggjakvøldið millum kl. 18.00 og 22.00.

Um onkur eru, sum vil hava bil at koma aftir lutunum, ringið so á tlf. 313501, so verða lutirnir heintaðir.

Tøkk

Eina hjartans tøkk senda vit tykkum mongu, sum luttóku í stóru sorg okkara, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi, pápabeiggi, ommusonur og svigarsonur

PÓL EYÐFINN ÓLASON POULSEN
f. 29.11.1963 – d. 31.10.1999

so brádliga varð tikin frá okkum. Tøkk til manningina umborð á »Ágot« og »Hvidebjørnen« og tykkum, ið vóru á kajuni og tóku ímóti tá »Ágot« kom aftur av lagnutúrinum.

Takk til heilsuverkið á Klaksvíkar sjúkrahúsi og til Jaspur Petersen, lækna, fyri stóra umsorgan.

Ein serlig tøkk til tykkum Niels Paula, Hans Eiler, Torleif, Aksel og Niels Jacob fyri bønir og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni, og fyri vitjanir og umsorgan tit sýndu okkum. Tøkk til sangarar og kirkjutænarar. Tøkk øll tit mongu, sum hava biðið fyri okkum í hesi sváru tíð.

Tøkk til starvsfólkið í Mylnuhúsinum fyri góða hjálp. Tøkk fyri vitjanir, uppringingar, brøv, fjarrit og peningagávur, blómur og kransar. Stóra tøkk til tykkum øll, sum komu við mati og tykkum, sum stóðu fyri og hjálptu til við ervinum. Eina hjartans tøkk fyri tað góðu hjálp, ið hevur verið sýnd okkum á ymiskan hátt.

Til seinast vilja vit takka øllum tykkum mongu, sum fylgdu Pól Eyðfinn til hansara seinasta hvíldarstað her á fold. Hjartans tøkk øll somul.

Fyri tey avvarðandi

Simona, Ísak, Olivia, Petur, Bárður, foreldur og systkin

»Tann, sum trýr á meg, skal liva um hann so doyr«
Johs. 11.25

At tingformaðurin setti tingfund ávirkaður av rúsdrekka leygardagin fekk Tjóðveldisflokkin at orða rúsdrekkapolitikk

Rúsdrekkamisnýtsla skal fáa avleiðingar

Tjóðveldisflokkurin hevur nú tikið avleiðingarnar av, at tinglimir hava rúsdrekkatrupulleikar. Flokkurin hevur, sum hin fyrsti, orðað ein rúsdrekkapolitikk

JOHN JOHANNESSEN

Tað skal fáa avleiðingar fyri tingmann við ábyrgdarstarvi, hevur hann trupulleikar við rúsdrekka.

Hetta staðfestir Tjóðveldisflokkurin í nýggjum rúsdrekkapolitikki, hann hevur orðað.

Flokkurin hevði týskvøldið fund, har millum annað rúsdrekkamisnýtsla millum tinglimir var til viðgerðar.

Tjóðveldisflokkurin sigur í kunningarskrivi, at málið er ikki nýtt. Rúsdrekkatrupulleikar hava altíð verið kendir í føroyskum politikki og helst eisini í øllum flokkum. Men nú vil Tjóðveldisflokkurin taka ítøkilig stig til at basa hesum trupulleika.

Bikari flotið yvir

Sum Sosialurin skilir á tingfólkum úr øllum flokkum og í mikudagsútgávuni av Oyggjatíðindum, hevði tingformaðurin, Finnbogi Ísakson, heldur nógv í høvdinum, tá hann setti tingfundin seinasta leygardag.

Júst hetta hevur fingið øði í fleiri tingfólk — serliga tingfólk Tjóðveldisfloksins, har tingformaðurin er limur. Tí varð spurningurin um rúsdrekkatrupulleikar millum tingfólk settur á skránna fyri fundin hjá tingbólki Tjóðveldisfloksins týskvøldið, har kravt varð, at greiða skuldi fáast á trupulleikanum.

Eisini viðgerðin av fullveldismálinum í uttanlandsnevndini hevur sambært nevndarlimum verið darvað av rúsdrekkatrupulleikum.

Tjóðveldisflokkurin hevur fleiri ferðir áður innanhýsis viðgjørt rúsdrekkatrupulleikar millum tinglimir floksins. Men nú Finnbogi Ísakson møtti fullur á tingi fleyt bikarið yvir. Tjóðveldisflokkurin góðtekur nevniliga ikki, at tingformaðurin, ið hevur landsins hægstu tign, møtir fullur upp í Løgtinginum.

Greiðar reglur

Úrslitið av fundi Tjóðveldisfloksins týskvøldið varð, at flokkurin hevur gjørt nakrar greiðar reglur, ið hann eisini mælir øðrum flokkum at gera. Flokkurin vísir í hesum sambandi á, at trupulleikin við misnýtslu av rúsdrekka finst í flest øllum flokkum.

Tjóðveldisflokkurin heldur tað vera neyðugt, at aðrir flokkar eisini samtykkja ein rúsdrekkapolitikk — bæði av menniskjaligum atlitum og til tess at ganga á odda fyri at bróta tabuini um rúsdrekkatrupulleikar í samfelagnum.

Megireglurnar, Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt í rúsdrekkaspurninginum, eru fylgjandi:

1. Flokkurin skal taka trupulleikan opið upp, tá hann er staðfestur, so tað ikki verða persónar øll tosa um, men ongin tosar við um trupulleikan.

2. Flokkurin skal stuðla teimum, ið hava trupulleikarnar, til at leita sær professionella hjálp og ráðgeving.

3. Flokkurin ger samstundis greitt, at um trupulleikin ikki verður loystur, fær tað avleiðingar fyri politisku ábyrgdarstørvini.

Full semja

Tjóðveldisflokkurin vísir á, at rúsdrekkapolitikkurin er gjølla viðgjørdur í fullari semju í flokkinum, og stigini eru longu tikin av teimum persónum í flokkinum, ið sjálvir meta seg at hava trupulleikar.

Flokkurin vísir á, at trupulleikarnir kunnu gerast so stórir, at teir hava bæði persónligar, menniskjaligar avleiðingar og avleiðingar fyri politiska arbeiðið hjá flokkum, á tingi og í landsstýri.

Men flokkurin vísir á, at tað er lítið virðiligt um spurningurin gerst til persónlig ella partapolitisk álop uttan atlit til ábyrgdarnar í slíkum máli fyri persónar, avvarðandi og flokkar.

Samráðast 17. mars

JOHN JOHANNESSEN

Fyrsti samráðingarfundurin millum landsstýrið og donsku stjórnina um ríkisrættarliga spurning Føroya verður eftir øllum at døma hildin í danska forsætismálaráðnum fríggjadagin 17. mars klokkan 16.00.

Løgmaður fekk týsdagin bræv frá danska forsætismálaráðharranum, har Poul Nyrup Rasmussen takkar fyri brævið hann fekk frá løgmanni 8. februar, um at ynskiligt hevði verið, at hol varð sett á samráðingarnar ein av døgunum millum 12. og 23. mars.

Poul Nyrup Rasmussen skýtur í brævinum upp, at fundurin verður hildin 17. mars í Danmark. Hesum hugskotinum tekur løgmaður undir við, men hann hevur kortini enn ikki svarað Poul Nyrup Rasmussen, at hol kann setast á samráðingarnar hendan dagin.

Løgmaður sigur, at tá landsstýrið hevur viðgjørt álitini, tá fekk frá uttanlandsnevnd løgtingsins í gjár, er klárt at fara til samráðingar nær tað skal vera. Tí tekur hann undir við uppskotinum frá Nyrup um at halda fundin fríggjadagin 17. í hesum mánaðinum.

Anfinn Kallsberg fer í dag at senda Poul Nyrup Rasmussen svar, og verður tað, at hann tekur undir við uppskotinum.